## DAGSINS MEINING

# Sjálvsavgerðarrætturin ikki eingangs

Á áhugaverdu grundlógarráðstevnuni hoyrdu vit enn ein serfrøðing fortelja okkum føroyingum, at vit hava sjálvsavgerðarrættin, at nýta til at loysa, um vit føroyingar vilja tað. Hesin er bert tann seinasti í einari langari røð av persónum, ið eru á einum máli um, at vit føroyingar eiga sjálvagerðarættin at brúka sum vit vilja. Tað høvdu verið stórtíðindi, um onkur kláraði at uppspora onkran uttanfyri føroyska Tjóðveldisflokkin, ið ivaðist í føroyska sjálvsavgerðarrættinum.

Sjálvsavgerðarrætturin er ómissandi. Eisini hetta tyktist verða breið semja um á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum herfyri. Hetta er eisini sagt fleiri ferð, men sitandi samgonga hevur tvíhildið um, at føroyingar ikki kunnu velja nakra aðra loysn enn fullveldi, tí so hevur man brúkt sjálvsavgerðarrættin til tað og harvið limað seg inn í danska rikið í allar ævir. Henda stóra misskiljing, ið Tjóðveldisflokkurin er upphav til, hevur forðað fyri framgongd í føroyskum sjálvstýrispolitikki.

Annars er tað einki nýtt, at sjálvsavgerðarrætturin ikki er nøkur eingangsrakett. Á hesum stað hevur mangan verið sett spurnartekin við hetta, ikki bara tá Høgni Hoydal heur borið slík sjónarmið fram, men eisini tá Anfinn Kallsberg og Helena Dam á Neystabø stóðu á sjónvarpsskýggjanum og søgdu, at føroyingar máttu endiliga ikki siga nei til fullveldi á eini fólkaatkvøðu, tí so vóru vit partur av danska ríkinum í allar ævir.

Uppundir seinasta val skrivaðu javnaðarvalevni um tað absurda í uppfatanini, har sjálvsavgerðarrætturin kann brúkast upp, men tað var sum at sletta vatn á gás, tá tað kom til samgonguflokkarnar.

Úrslitið av feilaktigu uppfatanini og "alt ella einki" politikkinum hjá sitandi samgongu er, at vit nú halda eina kós í sjálvstýrispolitikkinum, ið liggur aftanfyri Nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkinum, ið annars var tað mest afturhaldssinnaða uppskotið fyri valið.

Vit hava nú eina konservativa heimastýrissamgongu, ið einki nýskipandi ger viðvíkjandi ríkisrættarligu støðuni og harafturat tykist hava sera ringt við at yvirtaka mál undir Heimastýrislógini, ið nú er vorðin ótíðarhóskandi.

Ein endurskoðan av ríkisrættarligu viðurskiftunum grundað á einari breiðari semju er í eygsjón. Hetta var ein av niðurstøðunum á Grundlógarráðstevnuni í Norðurlandahúsinum, har eitt nú Hans Pauli Strøm, legði fram áhugaverd sjónarmið, ið kunnu byggja brýr til breiddina í føroyska fólkinum, heldur enn at tvíhalda um ein politikk grundaðan á smælast møguliga fleirtalið. Ein slík semja krevur tó, at fyrst og fremst Tjóðveldisflokkurin, men eisini hinir samgonguflokkarnir viðganga, at uppfatanin um, at sjálvsavgerðarættin er eingangs er skeiv. Gera hesir flokkar ikki tað, ja so eru vit aftur í gomlu "alt ella einki" støðuni, har einki uttan fullveldisætlanin hjá samgonguni ber til. Úrslitið av hesum verður, at vit ongan veg koma. Tað vildi verið spell fyri Føroyar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Krititiskir fjølmiðlar ella láturligir fjølmiðlar

**Niels Uni Dam**
*ba í samskifti og heimspeki*



Í Gestinum í seinastu viku peikaði blaðstjórin í Norðlýsinum á hvussu týdningarmikið tað var, at man fekk sær neyðugu vitanina, tá man setti sær fyri at føra kritiskan journalistik. Eg var púra samdur, og helt at hetta skuldi verið galdandi fyri allan journalistik. Nú hetta bleiv framborði í SVF, og sendingin bleiv endursend tvær ferðir, roknaði eg við at tíðindadeildin hjá somu støð, kanska fór at taka hetta til eftirtektar.

Men hvat hendur týskvøldi? Ein journalistur, sum eftir øllum at døma hevur mist alt samband við veruleikan, flýgur út í sína egnu fjølbroyttu dreymaverð, og roynir at gera eina gølu burturúr ongum - ja slett ongum sum helst. Eg fór veruliga at ivast í um viðkomandi journalistur var við sínar fullu fimm. Eitt handrit, var prógvi, Høgni Hoydal var bandittur og Føroya fólk var offur, hetta var ein søga um svik og ólevna.

Hyggja vit objektivt at prógvunum (hetta er eisini torført hjá mær, tí eg havi so ringt við at fata, at Tjóðveldisflokkurin kemur til niðurstøðuna um at halda fram, við at leggja kropp til slíkt óskil) so hava vit ein Landsstýrismann, sum hevur fyrireika seg til ein fund. Hann hevur fyrireika seg væl og professionelt, eisini um hvat sigast skal eftir fundin um leikur fór sum ætla. Men hesin journalistur fær á onkran løgnan hátt vent hesum til eina gølu, og tað er í mínari verð ein gøla. Eg vóni at leiðslan av tíðindadeildini tekur avleiðingarnar av hesum, og setur journalistin til uppgávur sum hesin megnar, tí politikkur er nokk ov torførur at skilja hjá viðkomandi.

Hetta skal ikki takast sum ein kritikkur av at SVF førir kritiskan journalistik, tí støðin hevur dugnaligar journalistar, sum megna hesa truplu uppgávu. Hetta er harafturímóti ein kritikkur av at ein journalistur, sum ikki megnar kritiskan journalistik sleppur at koyra eitt sovorði innslag í luftina, hatta er háðan av teimum dugnaligu journalistunum, sum verða settir í ringt ljós av hesum eina rotna súrepli.

# Miðnámsskúlarnir – ein landaskomm

**Jákup Andreasen**
*skúlastjóri á Fiskivinnuskúlanum*



Lat tað verða sagt beinanvegin, yvirskriftin er ikki nøkur ábreiðsla móti nøkrum persóni, stovni ella politiskum flokki, men bara ein staðfesting av, at flestu av bygningunum, sum miðnámsskúlarnir húsast í kring landið, eru undir alt lágmark, tá talan er um nútíðar krøv til undirvísing. Nógvar og stórar íløgur eru gjørdar síðan kreppuna, men fyribilsloysnirnar á miðnámsskúlaøkinum sigla bara víðari. Er tað ongin, sum dugir at síggja, at útbúgvingarmøguleikar undir tíðarhóskandi korum er ein íløga í framtíðina?

Og tað er okkurt sum haltar eftir mínum logikki. Er tað nøkur rímiligheit í, at arbeiðsumstøðurnar í nógvum førum versna munandi, tá næmingurin fer úr fólkaskúlanum og byrjar á miðnámsstigi?

**Støðan í dag**
Taka vit støðuna í dag og byrja í Suðuroy, so er talan um tveir skúlar - Studentaskúlan og Almanna- og Heilsuskúlan. Annar av hesum skúlum húsast í einum gomlum posthúsi og hin í einum sethúsum. Her er ein glotti at hóma, tí nakrar milliónir eru settar av til bygging av einum nýggjum studentaskúla í ár.

Í Havn hava vit tekniskan skúla, studentaskúla og handilsskúla. Tekniski Skúlin húsast í nøkrum barakkum Úti á Fløtum. Studentaskúlin er ov lítil og niðurslitin, og Handilsskúlanum manglar eisini pláss.

Fiskivinnuskúlin er eisini ein sethúsaskúli í trimum ymsum sethúsum. Tvey av húsunum eru leigað og kunnu sigast upp við stuttari freist. Skúlanum manglar skúlastovur og serstovur og minnir kanska mest um eina fyribilsloysn í einum "krígsherjaðum øki".

Studentaskúlarnir og Handilsskúlin á Kambsdali vóru bygdir fyri ikki so nógvum árum síðan, og eru helst teir einastu, sum lúka nútíðar krøv.

Í Klaksvík er eisini ein Tekniskur Skúli, og eftir hvat skilst av skriving í bløðunum herfyri, so manglar skúlanum bæði skúlastovur og serstovur.

Nakrir av skúlunum hava næmingaíbúðir knýttar at skúlunum, men í flestu førum er talið av íbúðum alt ov lítið til at nøkta tørvin. Nakrir av skúlunum hava als ongar næmingaíbúðir t.d. Fiskivinnuskúlin. Avbygdanæmingar mugu klára seg sum best ber til.

Men hví verður onki gjørt við at bøta um hølisviðurskiftini? Seinastu landsstýrismenninir í skúlamálum hava sitið so stutt, at teir eru burtur, áðrenn teir hava framt nøkur politisk avrik. Ein onnur forklåring er, at upphæddir, sum eru játtaðar til íløgur í miðnámsskúlar, eru so smáar og smábýttar, at tær ikki kunnu brúkast til nakað sum helst.

**Ráð til nýggja landsstýrismannin**
Væntandi fáa vit ein nýggjan landsstýrismann í skúlamálum í næstum. Míni ráð til hann eru hesi: Ger tær eina skjóta meting av hølisviðurskiftunum hjá miðnámsskúlunum kring landið. Far ikki undir alt í senn, men set upphæddir av, sum muna nakað, til nýggjar skúlabygningar, har tørvurin er størstur. Ger eina raðfesting og eina tíðar- og íløguætlan fyri, hvussu allir miðnámsskúlarnir kunnu dagførast innan eitt rímiligt áramál.

Eftir mínum tykki mugu tey dýru og pompøsu projektini bíða, til olja er funnin. Annars verður ongantíð komið á mál!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


## VIÐMERKINGAR

# Pínligi fundurin

**Nakrar (kanska endaligar) viðmerkingar um farna aðalfundin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag**

**Eyðbjørn Jakobsen**
*farin nevndarlimur í HAF.*



Havi frá ikki so fáum limum felagsins fingið fyrispurningar um, hví eg ikki tók við uppstilling til nevndarvalið — um eg var bangin fyri ikki at verða valdur aftur, ella hvat. Nei, tað var ikki slíkt sum lá aftanfyri ta avgerðina! Tað verður í míni verð altíð fundurin sum góðtekur ella vrakar eitt valevni. Kann ein ikki liva við tí, eigur ein ikki fáast við slíkt arbeiði.

Mítt ivamál var um tað fór at bera til at arbeiða saman við nývalda formanninum og hansara baklandi, og tað gjørdi eg upp við meg sjálvan, fór ikki at bera til. Tað hevði helst ført til standandi kríggj okkara ímillum. So fyri felagsins — ikki mína egnu — skuld valdi eg ikki at taka við afturvali. Ætlaði at lata málið fara, men kenni meg kortini noyddan at gera nakrar viðmerkingar til henda í fleiri mátar skemtiliga fund, samstundis í fleiri førum hin skendskasta, eg havi verið við til.

**Støðið verður lagt**
Fundarstjórin sigur frá, hvussu hann vil hava fundin at líða — biður um stuttar viðmerkingar og um onkur er ófantaligur ella fer út um mark, tá skal hann, fundarstjórin, støðga viðkomandi. Setir seg — at visa, hvar hann hoyrir heima? — saman við skrivaranum, formanni farandi og —komandi. Vanligt hevur verið at fundarstjórin (táið felagið hevði ein slíkan) stóð við ein pult fyri seg; ongantíð sitandi sum hesuferð, saman við ávísum parti....

Formaðurin stríðir seg ígjøgnum ársfrágreiðingina; orðalagið sigur frá, hvør hevur skrivað og at formaðurin hevur ikki rættiliga lisið uppá.

**Formansvalið**
Her ger fundarstjórin vart við, at hann letur báðar uppstillaðu siga nøkur orð, men hann fer ikki at finna seg í ólíkligari ella ófantaligari talu. Ger vart við, at um nakar sigur nakað, honum ikki líkar, verður viðkomandi støðgaður við brestin!

Jóhan Carl Dam sleppur fyrst framat og greiður frá, hvat arbeitt fer at vera fram ímóti um hann verður valdur. Onkrar viðmerkingar eru frá limum til báðar síðir, men tær lati eg hvíla í løtuni

Hans Joensen sigur eitt sindur um lívssøgu sína og fer so brestandi inn á, hvussu hann og aðrir í nevndini ikki hava fingið arbeiðsnáði síðan Jóhan Carl kom inn í nevndina fyri tveimum árum síðan; eisini her hoyrist, hvør skrivarin er. Sleingir gall og gor yvir Jóhan Carl og undirritaða. Hetta ger hann uttan minstu átalu frá fundarstjóranum!

Skrivari felagsins kemur síðan framat og sigur at hann ætlaði ikki at taka orðið, men dregur so fram tríggjar A-4 síður fer at lesa upp, og tann óhumskan sum ikki var áður, kom nú!

**Skálkur felagsins**
Hansara persónur, føldi hann, var so úthongdur alment at hann kundi ikki lata vera við at umhugsa (rættsligar?) avleiðingar. Hann staðfesti sum eitt slag av persónligari niðurstøðu yvirfyri 300 limum felagsins, at :"Eyðbjørn Jakobsen er ein skálkur!"

Øll hava vit eina kenslu av, hvat ella hvør ein skálkur er, og sambært orðabókina hjá M.A.Jacobsen og Chr.Matras er hesin: Skurk, slyngel, bedrager, skælm, gavtyv. Og samb. teirri dansk-føroysku (Johannes av Skarði): Skálkur, forherðingur, skarvur, beist, bakbeist, lúsakjálki, lúsaskarvur, lúsamunkur, jassur, kúllur.

Hetta mundi fundarstjórin eisini halda, ella kanska hevur hann fingið slíka kunning áðrenn, at hann helt hetta vera hóskandi málburð?

Sjálvur fari eg at lata teir limir sum hava vent sær til mín sum nevndarlim um teirra viðurskifti á arbeiðsplássinum og í øðrum lagi við skrivaran um somu trupulleikar at gera sínar niðurstøður!

Eisini staðfesti skrivarin at hann hevði hjálpt undirritaða úr onkrum (skuldi fundurin helst skilja, pínligum, fíggjarligum, menniskjaligum ella kanska heilt øðrum?) støðum, sum tá vóru mær ókendar!

**Glæntrileikur**
Hálvavegna skemtiligur leikur fór tó fram tá ið fundarstjórin — troyttur og svangur, kanska, legði fram roknskapin, nú sum formaður Eftirlønargrunnsins. Hetta gekk fyri seg í rúkandi ferð — t.d. tá ið hann kom fram til eftirlønarskyldur grunsins helt hann fyri, at hetta skilti hann ikki sjálvur og tí var eingin orsøk at viðgera tað málið, ha, ha! ( ha, ha, ha, ha! flenti fundurin) — eingin fekk høvi at seta minsta spurning (orsakað av teirri ørandi ferðini, hetta gekk fyri seg í) uttan ein, sum fekk formannin uttan at blunka at seta sína egnu mánaðarløn niður við kr. X pr. mð. Fundurin helt hetta vera skemt úr ovastu skuffu!

**Meira skemt**
Nú, eg eri inni á skemti — soleiðis sum fundurin sá tað, eigi eg at nevna eitt sum gjørdi meg og Jóhan Carl heilt til láturs.

Tað var áðrenn valið av nevndarlimum fór fram. Tá Jóhan Carl vildi skjóta upp verandi nevndarlimin, sum kom inn sum tiltakslimur táið Carl Johansen andaðist (og sum vit báðir av góðum grundum trúði stóð fyri afturvali), fekk hann eins og eg á ein sera niðurgerandi hátt at vita frá fundarstjóranum, at hesin eykalimurin skuldi sita eitt ár afturat! Vit sótu sum slignir á nev!. Hetta hildu mangir á fundinum vera sera, sera skemtiligt og flentu hjartaliga.

Tað sum fekk okkum báðar at sita sum Kánus var, at hetta mál var viðgjørt á nevndarfundi sum staðfesti, at hesin nevndarlimur (valdur við nøkrum og tríati atkvøðum sum tiltaks-limur í 2002) kundi bert sita til komandi (altso henda) aðalfundin. Viðkomandi var sjálvur á tí nevndarfundinum, og var tað ein samd nevnd sum staðfesti hetta. Her sótu tveir nevndarlimir sum ikki vistu, at ein nevndarniðurstøða var broytt, ella sett til viks! Hvør setti hesa avgerð til viks? Fundarstjórin? Skrivarin? — í hvussu so er, so hevur tað ikki verið nevndin, mær vitandi!

**Nýggjur rokniháttur**
Eingin heimild finnst í lóg Havnar Arbeiðsmannafelags sum loyvir eykalimi at sita longur enn til komandi aðalfund! Tveir limir vórðu — sum lógin fyriskrivar — valdir, men tríggjir komu inn í nevndina! Vit gera bert 1+1 til 3 so er hin triði gloppin innum gáttina uttan at vit hugsa um sovorðin smáting sum lóg felagsins, soleiðis! Flennið nú!

**Bakbit**
At arbeiða fram ímóti betri kunning til limir HAF´s um felagsarbeiðið sum heild, varð av mótstøðmonnum mínum, serstakliga av skrivaranum gjørt til ta, at eg varð lopin á Carl Johansen, sála, og hevði niðurgjørt hansara arbeiði felagnum og arbeiðarafjøldini at frama; tað skal standa fyri teirra og hansara egnu rokning. At Carl og eg til tíðir vóru rúkandi ósamdir um, hvussu fram skuldi farast, nýtist ikki at vera nøkur loyna. At vit til aðrar tíðir vóru heilt samdir og hevði eitt fyrimyndarligt samstarv, varð av valteknískum orsøkum gjørt til einkis. Eg fekk tann framíhjárætt at virka saman við Carl í nevndini í sjey ár, og fekk eg almikla læru burtur úr tí tíðini; honum veiti eg tøkk fyri tað!

**Onga kunning, takk!**
Eitt havi eg hug at vísa á: Hesuferð setti 33% av fundinum spurning við um higartil nýtta framferðin er hin rætta og tað meti sum eitt avgerandi framstig fyri felagið! Afturhaldið (umberið máliskuna — finni onga betri í løtuni) verður nú noytt — um ikki annað, so partvís — at leggja arbeiðið eftir forskriftum teir hava fingið frá síni (nú fráfarnu) andstøðu, sjálvir hava teir ikki víst seg at hava nakra kós! Í tí arbeiðnum ynski eg teimum alt tað besta.

At fólk sum tora og vilja bróta upp úr nýggjum verða avhøvdaði, er sæð fyrr! Eg dugi illa at meta farna aðalfundin øðrvísi enn at 66% av limunum ynskja framhaldandi at vera óvitandi um arbeiðslagið í felagnum og hjá nevndini.

Og at ein skrivari í einum felagi er høvuðáleypari og —talari ímóti øðrvísi hugsandi (nevndarlimum) á einum aðalfundi sigur nógv um arbeiðslagið, um hann (og hansara loyalitet) og í hesum føri, eisini um fundarstjóran!

# Framtøk í Suðuroy

**Hergeir Nielsen**



Staddur á tingi, fríggjadagin 7. mars kl. 16, fekk eg boð frá Jóannesi Eidesgaard um, at fundur skuldi vera um fejuleguna á Trongisvágsfirði dagin eftir. Svarað varð Jóannesi, at fundurboðini høvdu alt ov stutt skotbrá til, at eg slapp suður tað kvøldið.

Tingfundurin endaði einar tríggjar tímar seinni, og eg var bundin av fundi í Havn dagin eftir.

Kl. 18.30 sama dag lýsti Suðuroyar Kunningarstova við hesum fundi, og sagt var í lýsingini, at tingmenn skuldu vera við á fundinum.

Tá fleiri framvegis sóknast eftir, hví eg ikki var við, skal eisini sigast frá, at Suðuroyar Kunningarstova hevði ikki biðið meg koma við á hendan fund.

Eyðun Eltør segði seg hava fingið fundarboðini eina viku frammanundan.

Vøkru náttúruna úti við Lítlu Hólmar eri eg sjálvandi varugur við, og royndi eg longu 7. nov. í fjør at broyta avgerðina um at leggja eina nýggja ferjulegu har á leiðini.

Skotið varð upp á samgongufundi, at fyri somu løgu, sum ætlað var til eina nýggja ferjulegu, kundu vit fáa eina felags almenna kommunala havn á Drelnesi, eina í Vági og koma hálva leið fram millum Øravík/Hov.

Framlagda fíggjarlógaruppskotið fevndi tá bara um samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði, og endin varð, at allar tríggjar verkætlaninar vóru samtyktar í desember á fíggjarlógini 2003.

Tað var ivaleyst skilagott, at Jóannes Eidesgaard, Johan Dahl og Hendrik Old fóru suður við Eyðun Eltør at kunnað seg um umstøðurnar har, og kann eg bara harmast um, at mær ikki untist høvi til at vera við.

Á kyndilsmessu handaði eg landsstýrismanninum eitt skrivligt tilmæli um ger av Øravíkar Hov tunlinum samsvarandi uppskoti eg fekk frá NCC. Hesum skrivliga tilmæli hevur landsstýrismaðurin ikki svarað mær enn, og er tað eisini handað nevndarlimunum í vinnunevndini.

Tá tað ikki er á hvørjum degi, at landsstýrismaður fær uppskot um at strika vegagerð fyri 42 mió.kr., og fáa tunnil fyri tveir triðingskostnað av upprunaætlan, vænti eg mær reiðiliga skjótt svar upp á hetta skrivliga tilmæli mítt.

Sum skilst, so eru menn farnir undir nýggjar kanningar av einum máli, ið var klárt at leggja á tingborð. Helst tí, at ásannað varð, at upprunaliga ætlanin ikki var nóg skilagóð.

Hví almennar kostnaðarmiklar kanningar í heila tikið skulu gerast av eini verkætlan, ið kann útbjóðast fyri fastan kostnað, skiljið eg hinvegin ikki rættiliga.

Svarð varð lovað eftir 2 vikum. Nú 6 vikur eru farnar, man svarið liggja nakað nær.

Samferðsluhavnin hevur ligið 9 vikur í vinnunevndini, og hevur ma. NCC verið á fundi har. Hví henda nevndarviðgerð er so drúgv, er mær eisini ein gáta.

Løgtingið hevur samtykt at fara undir Øravíka Hov tunnilin í ár, og løgtingsins vilja fara vit at fylgja so ella so.

Játtaða upphæddin í hesum árinum røkkur ikki langt, men tunnilin kemur at liggja har, sum vit suðringar siga, at hann skal liggja.

So kunnu menn kanna, so galt teir vilja.

Hvussu vit skilabest loysa tunnilsgerðina og samferðsluhavnina, og um hesar kunnu tengjast at hvørji aðru, fáa vit at síggja í næstum, tá ið vinnunevndin og landsstýrismaðurin hava viðgjørt hesi mál við atlitið at náttúru, kostnaði og verkligum viðurskiftum annars.